# ·ørvi hjá





*Inni í húsinum høvdu børnini júst fingið ís frá arbeiðsfólkunum. Hetta dámdi teimum avbera væl.*
*Mynd: Teitur Joensen*

spæla á einum heilt nýggjum vølli.
- Ein av hesum smáu sparkivøllunum er í gerð beint við síðuna av barnagarðinum, og henda sleppa børnini skjótt at brúka. Vit eru í ferð við at gera ein lítlan tunnil frá barnagarðinum yvir til fótbóltsvøllin, so børnini sleppa frá at ganga á vegnum, um tey fara yvir til vøllin, sigur leiðarin í barnagarðinum.
Sostatt sleppa tey, sum fara í barnagarðin eftir summarferiuna, at sparka á einum stórum sparkivølli, um tey vilja.

### Summarfrítíðin fyri framman

Sama dag, sum vit vóru og vitjaðu í barnagarðinum, fór onkur av arbeiðsfólkunum í summarfrí. Og tað verður heldur ikki leingi, fyrr enn fleiri av hinum arbeiðsfólkunum eisini fara í summarfrí. Fríggjadagurin er nevniliga seinasti arbeiðsdagurin undan summarfrítíðini, so arbeiðsfólkini hava bert ein dag eftir.
Hetta merkir tó ikki, at fólk í Sørvági ikki kunnu fáa barnaansing, tí pláss verður fyri nøkrum børnum gjøgnum summarið.
- Tað er rætt, at stovnurin fer í sumamrfrí fríggjadagin, men foreldur, ið hava brúk fyri, at børnini verða ansaði, kunnu fáa barnaansing her um summarið. Vit hava pláss fyri á leið 20 børnum í summar, sigur Gitta av Kák at enda.

## Nýggjur sparkivøllur í Sørvági

**Børnini í Sørvági kunnu nú spakuliga byrja at sparka á nýggja sparkivøllinum í Sørvági, sum er um at vera liðugur**

VESTANSTEVNA
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Teir sokallaðu sparkivøllirnir eru blivnir sera væl umtóktir kring landið, og tað verða bara fleiri og fleiri av hesum vøllum gjørdir. Í Vágum hava verið tríggir slíkir sparkivøllir. Ein hevur verið í Sandavági, ein í Miðvági og ein í Bø, og nú fer fjórði vøllurin í Vágunum skjótt at vera liðugur.
Sørvágs kommuna hevur nevniliga arbeitt við at gera ein slíkan vøll, og nú verður ikki leingi, til arbeiði er liðugt. Vøllurin er komin so mikið væl áleiðis, at børnini í Sørvági saktans kunnu spæla á vøllinum.
Vøllurin liggur ovarlaga í Sørvági beint vestanfyri nýggja barnagarðin, so børnini í barnagarðinum fáa eisini nyttu av vøllinum, tá hann einaferð verður liðugur. Sparkivøllurin liggur harafturat tætt við nýggju útstykkingina í Sørvági.



*Nú er ein nýggjur sparkivøllur eisini komin í Sørvági. Hann er ikki heilt klárur enn, men tað verður ikki leingi*
*Mynd: Teitur Joensen*

## Sluppin fríðkar um fótbóltsvøllin

**Sluppin, sum stendur vestanfyri fótbóltsvøllin, er nú blivin málað, og í nýggjum hami fríðkar hon nú rættiliga um økið kring fótbóltsvøllin**

VESTANSTEVNA
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Nógv munnu helst kennast við sluppina, sum hevur staðið í økinum tætt við fótbóltsvøllin niðri í bygdini. Henda sluppin hevur staðið har í fleiri ár, og ikki kann sigast, at sluppin beinleiðis hevur pyntað um bygdina.
Tað er tó skjótt, at ávís ting kunnu broytast, og tað er júst hetta, sum sluppin er eitt gott dømi um. Fólk í Sørvági hava nevniliga tikið avgerð um at mála sluppina, og nú er als eingin ivi um, at sluppin fríðkar sera nógv um bygdina – serliga økið kring fótbóltsvøllin.
Fyri uttan málingina, so er sluppin eisini blivin flutt nakað, soleiðis at hon nú stendur við suðurvestur hornið av sjálvum fótbóltsvøllinum. Her er eisini gjørt eitt lítið økið kring sluppina, og ætlanin er at fáa eitt ella fleiri borð at standa í hesum horninum av vøllinum, soleiðis at fólk rættiliga kunnu hugna sær her.




*Sluppin, sum hevur staðið við fótbóltsvøllin, er nú blivin málað og flutt eitt sindur, og nú pyntar hon rættiliga um økið vestanfyri fótbóltsvøllin*
*Mynd: Teitur Joensen*